


# Ársins føroyska **YouTube** innslag skal heiðrast

Sum nakað nýtt, hevur Rás2 gjørt av at heiðra føroyingi, sum hevur gjørt sær ómak á netinum við føroyskum innslagið.

Vit kenna helst øll Sonhard Mariuhønina, Effo-dreingin í Sørvági og fleiri við teimum, og føroyingar eru seinnu árini blivnir sjónligir í videoheiminum á internetinum.

Fleiri av teimum sjónbondunum, sum í ár eru løgd á internetið, hava eisini sett síni spor í føroyska samfelagið. Summi eru undirhaldandi, onnur listarlig og fyrireikrarnir handan Planet Awards halda, at tíðin er komin til at heiðra tey, sum ganga á odda í hesum nýggja rákinum.

Tað er ein serlig dómsnevnd hjá Miðlahúsinum, sum finnur tað sjónbandið, sum hevur gjørt størsta ávirkan á føroyska samfelagið í 2010.

Á sjálvum Planet Awards, sum verður 29. Desember, verða tey tilnevndu sjónbondini víst, og síðani verður vinnarin avdúkaður.

# Ársins besta tónleikamynd 2010

Seinnu árini hevur Føroyar av álvara ment seg sum tónleikaland. Vit hava fleiri festivalar á hvørjum ári og konsertirnar gerast alsamt størri og fleiri í tali.

Tí hava fleiri føroyingar eisini nógvar góðar myndir frá føroyska tónleikalívinum, sum vísa hvussu nógv tónleikurin í Føroyum hevur at siga – serstakliga fyri ungdómin.

Tí hevur Rás2 eisini gjørt av, at heiðra tann persónin, sum hevur tikið tað bestu tónleikamyndina i Føroyum í ár. Allar myndir eru vælkomnar, og vit seta bert sum krav, at myndirnar hava okkurt við tónleik at gera.

Allar myndir, sum verða sendar inn til planet@ras2.fo, verða seinni lagdar út á planet.fo, og vinnarin fær eina peningagávu áljóðandi 5000 krónur.

